# Hósdagur 21. mars

**SVF**

18.25 DV í kvøld
18.30 Pocahontas 6:26
19.00 Eg noyðist at lurta e
19.30 Loyndarmál og lygnir - norsk sending
20.00 Dagur og Vika
20.20 Magn
20.45 Úr Kap til Kilimanjaro - do. ferðafrásøgn
21.15 Airport - úr Heathrow floghavn
21.40 Krimitímin: Anna Holt 14 - svensk røð
22.35 Vald andanna II
23.20 Vald andanna - eyka
23.30 Liðugt

**EUROSPORT**

7.30 Olympic Games - Olympic Magazine
8.00 Figure Skating - World Championships - Live
11.30 Figure Skating - World Championships
13.15 Biathlon - World Cup - Live
14.45 Biathlon - World Cup
16.00 Xtreme Sports - Winter X Games
17.00 Football - Gillette Dream Team
17.30 Figure Skating - World Championships
20.00 Boxing - From Miami
21.45 Football - World Cup Stories
22.00 News - Eurosportnews Report
22.15 Rally - FIA World Rally Championship
22.45 Football - UEFA Cup
23.45 Rally - FIA World Rally Championship
0.15 News - Eurosportnews Report
0.30 Close

**BBC PRIME**

0.05 TLZ: »Ape-Man – Adventures In Human Evolution – Contact«
1.00 TLZ: »Natural Design – Driven by Design«
2.00 TLZ: »Dramsci – Making Astronauts«
2.30 TLZ: »Hollywood Science«
2.40 TLZ: »Science Bites – Knots and Bugs«
2.45 TLZ: »Truth Will Out«
3.00 TLZ: »The Chemistry of Creation«
3.25 TLZ: »Pause«
3.30 TLZ: »Unearthing the Woodside Web«
4.00 TLZ: »Trouble at the Top – A Model MD«
4.40 TLZ: »Science In Action«
5.00 Le Club
5.15 Le Club
5.30 The Ozmo English Show
6.00 Bits & Bobs
6.15 The Shiny Show
6.35 Angelmouse
6.40 Playdays
7.00 Get Your Own Back
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Country Tracks
9.15 Battle of the Sexes in the Animal World: »Choosy Female«
9.45 Vets in Practice: »Road to Recovery«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Trial of a Timelord – The Ultimate Foe«
11.30 Holiday Swaps: »Thailand/Italy«
12.00 Eastenders
12.30 Our Mutual Friend
13.30 Ready Steady Cook
14.15 Bits & Bobs
14.30 The Shiny Show
14.50 Angelmouse
14.55 Playdays
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »Where Sheep May Safely Graze«
16.45 The Naked Chef: »Wedding Bells«
17.15 Gardeners' World 2001
17.45 The Weakest Link
18.30 Holiday Swaps: »Cornwall/France«
19.00 Eastenders
19.30 Goodness Gracious Me
20.00 Dangerfield: »Diminished Responsibility«
21.00 The Young Ones: »Flood«
21.30 Body Chemistry: »Hormonally Yours«
22.20 The Big Trip
22.40 Holiday Snaps: »Rhodes/Guernsey/Greece/Caribbean«
23.00 Casualty

**BBC WORLD**

0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Reporters (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 Holiday (r)
9.00 BBC News – followed by Weather
9.30 Africa Direct (r)
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 Asia Today
10.45 Sport Today
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 HARDtalk (r)
12.00 BBC News – followed by Weather
12.30 World Business Report
12.45 Sport Today
13.00 BBC News – followed by Weather
13.30 The Car's The Star (r)
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 Africa Direct (r)
15.00 BBC News – followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.15 World Business Report – followed by Weather
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News – followed by Weather
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News – followed by Weather
20.30 Click Online
21.00 BBC News – followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News – followed by Weather
22.30 Panorama
23.00 BBC News – followed by Weather
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

**3**

5.30 Børne-hjørnet med Disney
7.10 TV-shop
8.10 Hvide løgne
8.35 Ricki Lake
9.25 Ricki Lake (G)
10.20 Horton-sagaen (G)
11.10 Horton-sagaen
12.00 Med på moden
12.30 Pæn pige – sej sild
12.55 Melrose Place – Classic
13.50 Felicity
14.40 Baren 2002 (G)
15.10 Dawson Creek – Classic
16.05 Ricki Lake
17.00 Alle elsker Raymond
17.30 Vild med dig
18.00 Alle tiders barnepige
18.30 Baren 2002
19.00 Skadestuen
20.00 Baren 2002 – direkte
21.00 Sex and the City
21.35 The Guardian
22.30 Baren 2002 (G)
23.00 Baren 2002 – direkte (G)
0.00 Seinfeld
0.30 Simpsons
1.00 Nash Bridges
1.55 Ricki Lake (G)
2.45 Drøm videre
3.15 Guys like us
3.30 Sunset Beach
4.35 Godnat

**ÚF**

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Olaf Magnussen á Toftum lesur
7.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunrásin - Bjarni Mohr og Hilmar Jan Hansen leggja til rættis
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Olaf Magnussen á Toftum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Jóhann Mortensen leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Femja Petersen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í vingarðinum - Alexander Samuelsen leggur til rættis
18.00 Barnaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera: Deyðanum nær - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Tá ið eg havi málað summarhúsið - Páll Danielsen lesur 4. part av skaldsøgu eftir Oddvør Johansen
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

**Rás**

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16.00 Fótbóltsprát - John William Joensen leggur til rættis, sent verður úr Studio 7
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Hendur sum Jesus - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.15 Okkara dagliga breyð Pínslusøga várs Harra Jesu Krists
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ M. C. Restorff (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen
16.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.30 Okkara dagliga breyð Pínslusøga várs Harra Jesu Krists (e)
20.40 Møtilýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379
0.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti, Okkara Dagliga Breyð, Blandaður tónleikur, o.a.
2:00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bibliuna (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, Okkara Dagliga Breyð, o.a.
6.00 Vit gevast

## Tilvera: Deyðanum nær

ÚF Hóskvøldið kl. 19.00

Gestur í útvarpsstovuni er Sofus Poulsen. Fyri fáum árum síðani var hann staddur umborð á fiskiskipi sum kokkur. Hann gjørdist sera sjúkur, datt um og lá nógvar dagar uttan vit.

Tá hevði hann eina uppliving, sum heilt hevur broytt lív hansara, tí sum hann sigur, tú kanst liva uttan Jesus, men ikki doyggja uttan Hann, tí tá er Hann har.

## Pocahontas 6:26

SVF Hóskvøldið kl. 18.30

Pocahontas er so findarglað – Ættartingið við Winnipeg vatnið hava avjørt at lata Sannfjøður fylgjast við henni á ferðini. Sannfjøður er eisini sera glaður um avgerðina – hann hevur viljað hetta leingi.

Tey fara avstað og eftir at hava gingið ein langan tein, semjast tey um at finna eitt stað at sova.

Morgunin eftir halda tey leiðina fram og koma fram á eina lítla bygd við uml. 12 smáttum. Tey tosa aftur og fram um, hvussu tey nú skulu gera.

## Úr Kap til Kilimanjaro

SVF Hóskvøldið kl. 20.45

– Donsk ferðafrásøgn

Røðin er nýggj donsk ferðafrásøgn við átta pørtum. Lívfrøðingurin og journalisturin Lars Ørlund leggur leiðina úr sunnasta enda í Afrika og heilt norður til Kilimanjaro.

## The Guardian



3 Hóskvøldið kl.21.35

Fallin & Associates berjast við eitt sex-chikane mál, fyri ein av teirra stóru kundum. Nick fær samstundis eitt nýtt mál, sum hesuferð er um ein homoseksuellan tannáring, sum hevur brúk fyri einum hóskandi verja. Ein dómari hevur fyrr sagt nei til at geva einum homoseksuellum parið ábyrgdina av dreinginum. Nick og hini á sosialskrivstovuni er tó ikki í iva um, at hetta er tann besta loysnin fyri dreingin og taka tí málið uppaftur…

## ÚF Morgunlestrar
18.–23. mars

***Olaf Magnussen á Toftum lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 18. mars:**
nr. 192 Mín Jesus, lat mítt hjarta fá
nr. 406 Bið, o, Jesus, fyri mær

**Týsdagin 19. mars:**
nr. 335 O, Guð, hav okkum við títt orð
nr. 332 Títt orð er, Guð, várt arvagóðs

**Mikudagin 20. mars:**
nr. 517 Hvat var Guðs jørð eitt fagnarstað
nr. 468 Frelsari, hevði ikki eg teg funnið

**Hósdagin 21. mars:**
nr. 520 Sólin hevur sama lag
nr. 4 Heilagt ljóð oss legg á tungu

**Fríggjadagin 22. mars:**
nr. 477 Jesus kæri, før tú meg
nr. 583 Mín bátur er lítil, títt hav er so stórt

**Leygardagin 23. mars:**
nr. 306 Mikli Drottur, gev mær megi
nr. 305 Leið meg, Guð, á lívsins veg



Landsstýrissamtykt:

# Vardi Verkstaðurin fær nýggj høli



*Nógv skal gerast við bygningin, áðrenn hann kann nýtast til Varda Verkstaðin*

**Á landsstýrisfundi týsdagin bleiv samtykt, at Vardi Verkstaðurin á Brekku í Klaksvík skal í nýggj høli**

MENNINGARTARNAÐ
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** - Hetta má metast sum eitt stórt framstig fyri Verkstaðin, sigur landstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum, Sámal Petur í Grund í viðmerking til, at landsstýrið týsdagin samtykti, at Vardi Verkstaðurin í Klaksvík fær nýggj høli.

Hølini, talan er um, er bygningurin har Toll og Skattstova Føroya, Norðoya Deild heldur til.

- Hesin bygningur liggur sera væl fyri, tá hugsað verður um at hann er mitt í býnum, sigur Sámal Petur í Grund.

Landsstýrismaðurin sigur eisini, at hølisumstøðurnar har eru nógv betur. Millum annað til arbeiðið við at gera plattar, tí at tað er sera høgt millum loft og gólv í kjallaranum.

Byrjanin til alt hetta, var av fyrstan tíð tosið um, at Varda Verkstaðnum tørvaði eina lyft.

- Síðani hava vit tingast við eigaran av tí hølinum, har Verkstaðurin heldur til nú, um hvør eigur at taka sær av tí arbeiðinum, greiðir Sámal Petur í Grund frá.

Men tað er alt farið í gloymibókina, nú Vardi Verkstaðurin hevur fingið eini høli, sum landið eigur.

Núverandi leigusáttmáli hjá Varda Verkstaðnum gongur ikki út fyrr enn 01.07.2004. Ætlanin er, at tíðin skal nýtast til at gera tey nýggju hølini í stand til at hýsa Varda Verkstaðnum.

Norðoya Deildin hjá Toll og Skatt má sostatt eisini flyta, og verður tað inn í bygningin hjá Klaksvíkar Byggivirki á Klaksvíksvegnum.

# Forvitnisligt tiltak á Hotel Norð



*Hotel Norð á Viðareiði verður leygardagin karmur um áhugavert tiltak*

**Listin verður sett í hásætið, tá Hotel Norð komandi leygardag verður karmur um eitt øðrvísi tiltak fyri øll listaráhugað**

TILTAK
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Viðareiði:** Tað er Maria Mørkøre, listarkvinna í Klaksvík, sum stendur aftan fyri tiltakið.

Maria útstillar sjálv fleiri av oljumálningum sínum, sum fólk so kunnu ganga og njóta, meðan kvinnukórið Suð hoyrist í bakgrundini.

### Fyrilestur

Eisini verður ein fyrilestur á skránni um listarkvinnuna Fridu Zakariassen, ið er ættað úr Klaksvík. Frida andaðist fyri nøkrum árum síðani, men er kend víða um fyri listarverk hennara.

Hesin fyrilestur kemur at innihalda ymiskt áhugavert um lív hennara.

### Tónleikur og list

Eftir fyrilesturin kemur kvinnukórið Suð at framføra nøkur løg.

Kvinnukórið Suð er eitt nýtt kór, sum er sprottið úr teim 17 Sangarum, ið gjøgnum árini hevur víst seg sum eitt framúr kór við góðum sangarum.

Afturat teimum fer Hanna Jensen eisini at hava eina soloframførslu, meðan Kristjan Hansen spælir undir við gittar.

### Leskiligur døgurði

Allan leygardagin verður høvi til at keypa kaffi og annað leskiligt frá hotellinum, og um kvøldið verður góður døgurði eisini bjóðaður gestunum.

Frá Hotel Norð frætta vit, at tey fegin vilja hava at vita, hvussu nógv fólk verða við til døgurðan. So longu nú ber til at bíleggja sær borð til døgurðan við at ringja til Hotel Norð.

### Hugna sær

Maria Mørkøre fortelur, at longu nú hevur hon lagt merki til stóran áhuga fyri tiltakinum millum fólk.

- Nógv hava fregnast nærri um hetta, og eg veit fleiri, ið ætla sær ein túr norður, sigur hon.

- Hetta er ein upplagdur møguleiki til at hugna sær og slappa av ein heilan dag. Náttúran á Viðareiði er eisini nakað heilt fyri seg, so fortreytirnar fyri einum góðum dagi eru heilt klárt til staðar, sigur Maria at enda.

Tiltakið byrjar leygardagin klokkan 14.00, og heldur á heilt til klokkan 22.30.

# Eystlaks nýggjan fóðurtanga

Eystlaks hevur fingið ein nýggjan fóðurtanga. Talan er um ein rættiliga stóran tanga, sum tekur eini 25 – 30 kubikk. Tangin er settur saman á Klaksvíkar Sleipistøð og skal setast upp á alibrúkinum norðuri á Norðtoftum.

**- sae –**

